Tíðindabrævið
# Hugin & Munin
Granskingarverkætlanin fyri Økismenning

Nr. 2 juli 2000 1. árg.

# Rusksele: Noktaði at avtoftast



Í 1988 var næmingatalið í skúlanum í norður-svensku bygdini Rusksele komið niður í 32 og skúlin skuldi niðurleggjast. Lagnan hjá Rusksele púra greið: Bygdin við teimum 275 íbúgvunum fór at vera avtoftað innan langt umleið.

Hesi útlit gjørdu, at kallað var til fundar, og spurningarnir, ið bygdarfólkið setti sær, vóru einfaldir: “Vilja vit framhaldandi búgva her?”; svarið á fundinum var ja. Annar spurningur var sostatt: “Hvat gera vit?”.

Bjargingarætlanin eydnaðist. Í dag búgva 315 fólk í Rusksele, og talið av skúlabørnum er 50. Í 1989 gavst einasti handilsmaðurin, tí umsetningurin uppá 1,7 mill. krónur var ov lítil til tess at fáa avlop; handilsmaðurin, ið tók yvir, hevur í dag ein umsetning uppá 3,5 mill. krónur, tí fólkatalið er vaksið. Fólk flytir til Rusksele, og eini 20 fólk ferðast hvønn dag *til* Rusksele at arbeiða!

- Í dag er skúlin ikki hóttur av niðurlegging, og fyritøkurnar hava arbeiðsmegi á staðnum, so eg tori at siga, at Rusksele er eitt lívført bygdarsamfelag, ið eisini er lív lagað framyvir, sigur Sven-Olof Dahlgren úr Rusksele, ein av stigtakarunum til bygdarfundin.

Hvat varð so gjørt í 1988? Bygdarfólkið skifti seg sundur í tríggjar evnisbólkar; ein bústaðarbólk, ein vinnulívsbólk og ein trivnaðarbólk. Ein høvuðstrupulleiki vóru vantandi bústaðarmøguleikar. Sven -Oluf sigur, at tey tilkomnu høvdu verið verðandi undir øllum umstøðum; takið var at geva teimum ungu og børnum teirra ein kjans at búseta seg í Rusksele. Bygdar vórðu 23 íbúðir í tveimum lágum bygningum, og eisini varð bygt eitt ellisheim/eldrabýli við 17 íbúðum.

- Hetta hevði við sær, at yngri familjur, sum áður ongan møguleika høvdu, nú knappliga høvdu tveir: Tey kundu leiga sær eina av íbúðunum ella tey kundu keypa eitt hús, sum eldri fólk vóru flutt úr, sigur Sven-Olof Dahlgren.

Størsta arbeiðsplássið er ellis- og eldrabýlið, har 32 fólk arbeiða. Á einum snikkaravirki arbeiða í dag fýra (eitt í 1988, á einum øðrum 20 (13 í 1988), og á tí størsta 28 (seks í 1988). Á sagverkinum arbeiða í dag 14 (trý í 988). Í 1991 bygdi kommunan átta smáttur og eitt væl útgjørt kampingpláss; eitt fólk hevur starv har um summarið og fær allar inntøkurnar. Í 1990 tilnevndi blaðið “Dagens Industri” Rusksele sum býin við flestum fyritøkum fyri hvønn íbúgvan; í dag eru fleiri 30 størri og smærri fyritøkur í bygdini við egnum roknskapi ...! Talan er sostatt ikki um eina sovibygd, haðani fólk koyra aðrastaðir at arbeiða, tó at 5-6 arbeiða á skaðastovuni í Lycksele.

Børnini ganga í skúla í Rusksele til og við 6. flokk, og fara síðani til Lycksele, har 9.000 fólk búgva (13.000 í allari kommununi); har er eisini studentaskúli, og tað tekur um hálvan tíma at koyra. Har fer ungdóminum eisini, tá ið hann skal í býin í vikuskiftinum. Tey, ið ætla sær undir hægri lestur, mugu til Umeå, hagar tað tekur hálvanannan tíma at koyra; tá flyta tey úr Rusksele.

Fólk, ið flyta til Rusksele at búgva, hava flestu okkurt samband við bygdina: Antin eru tey haðani ella kenna tey onkran. Tó eru fleiri, ið eru flutt hagar, hóast tey einki samband hava við bygdina; tey flyta snøgt sagt tí tey hava frætt um trivnaðin.

- Her er vakurt og friðarligt umhvørvi, men fyrst og fremst eru vit eitt bygdarsamfelag, har hvør einstakur hevur kensluna av at varða av bygdarfelagsskapinum og sostatt eisini tekur ábyrgd fyri trivnaðinum, sigur Sven-Oluf Dahlgren.

## “Eingin ger tað fyri okkum!”



Sven-Olof Dahlgren var ein teirra, ið kallaði til fundar fyri 12 árum síðani, og hann verður roknaður sum eldsálin í bjargingarætlanini av Rusksele. Hann sigur, at fyrsta og avgerandi treytin fyri, at tað eydnaðist at bjarga bygdini frá undirgangi, var, at íbúgvararnir tóku seg saman og vóru samdir um høvuðsmálið.

- Bygdar- og økismenning má so at siga koma úr neðra, frá fólkinum sjálvum. Tað nyttar einki at sita hendur í favn og bíða eftir at onkur í stórbýnum loysir tað fyri okkum. Hví skuldu tey tað?

Sven-Oluf Dahlgren sigur, at tað avgerandi er, at bygdarfólkið – ung sum eldri – taka ábyrgd og leggja orku í.

‘Problem’ og ‘Tað gongur aldrin’ eru bannlýstar vendingar.

Tað ræður um at vera

*Framhald á síðu 3*



# Grannastevna

**Bødvar Poulsen, í Dali, skrivar**

# "Búgva fólk í Dali?"

Seinastu 30 árini hevur verið tosað nógv um bygdamenning. Eg tosi bert út frá mínum egnu royndum um ein tátt, ið hevur týdning fyri bygdamenningina, og tað er um møguleikan fyri at fáa fígging til vinnuligt virksemi í sokallaða útjaðaranum. Lat meg straks koma til niðurstøðuna, sum mínar royndir hava givið mær: *Hvørki privatir ella almennir fíggingarstovnar eru til fyri útjaðaran, men bert fyri teir partar av landinum, sum í forhond eru væl fyri!*

Fyri fimm árum síðani kastaði eg – sjálvur havnarmaður við stóra H – saman við gentu úr Dali. Í fjør gjørdu vit av, at vit og døtur okkara – ávikavist tvey og trý ár – skuldu flyta úr Havn til Dals at búgva. Har ætlaði eg mær at gera tað, sum eg eri vanur at gera: Fáa mær eitt lítið snikkaravirki og smíða trappur. Av tí at eg sjálvur skuldi gera mesta partin av arbeiðnum saman við góðum fólki, so kundi prísurin á virkinum haldast niðanfyri 400.000 kr. við grundstykki og útgerð. Í Havn hevði bara grundstykki óivað kostað um 400.000 kr.; í Dali kostaði tað 10.000 kr.

So fór eg at fáa mær fígging. Men tað er ein døpur søga! Eg kontaktaði Útnorðurgrunnin, Føroya Sparikassa og Føroya Banka umframt TK-stovuna. Eg greiddi frá ætlanini og vísti teimum eina ordraváttan uppá 42 trappur a 18.000 kr. Reaktiónin var púra greið: "Snikkaravirki í Dali ... tú manst vera óður í høvdinum!" Grundgevingin var, at Dalur liggur ov langt burtur (eg fekk ongantíð at vita burtur frá hvørjum); virksemið fór at vera ov ótrygt og tá var trygdin fyri láninum (bygningurin) ikki nóg góð!

Hevði ætlaða virksemið ikki megnað at gjalda lánið aftur, so skilir man væl støðuna hjá fíggingarstovnunum. Íðan, hvussu gongst við virkseminum í Dali? Jú, tær 42 trappurnar verða latnar sohvørt sum keyparin er klárur at taka ímóti (4 eru leveraðar, 24 liggja og bíða), og 8 trappur eru leveraðar til aðrar keyparar. Tær kundu verið nógv fleiri, men eg sigi nei til umleið eina trappubílegging um dagin! Bygningurin stendur í góðum 400.000 kr. (*eingin* kontant eginfígging), men virksemið er so mikið nógv, at á jólum eri eg helst skuldarfríur. Ein ungur dalbingur hevur biðið um lærupláss, men hóast eg hevði havt brúk fyri honum, so fái eg ikki sagt ja, tí eg havi ikki rakstrarfígging.

Hvussu ber tað so til, at virkið kom í gongd? Fyri meg er tað ein hugalig søga, men samfelagsliga er hon einki minni enn ein skandala. Jú, Pf. Maria Poulsen lat mær VHS-vørur fyri 30.000 kr., Pf. Leif Mohr lat mær el-útgerð fyri 40.000 kr., og Pf. Balslev lat mær tilfar til bygningin fyri 250.000 kr. umframt trapputilfar fyri 150.000 kr. at hava á goymslu. Eingin skrivlig avtala fyriliggur um hesa fígging! Hon byggir fult og heilt á tað álit, sum kunnleiki til hvønnannan og bransjuna gevur.

Eitt aftrat: Undir øllum umstøðum tørvaði mær 100.000 til tað leysa, serliga til leverandørar, ið eg ikki kendi persónliga. Um ikki annað, so bert 30.-40.000 kr. fyri útgrevsturin. Eg fekk aftur nei!Men fíggingarstovnarnir vóru klárir, tá ið foreldur míni vildu taka lán mína vegna ... um 60 ára gomul og við frívirði í einum húsum, tey hava strevast fyri at kunna sita í á ellisárum.

Fyri alla hesa vælvild bygdi eg virkið. Við dyggari hjálp gjørdi eg fundament og 'beinagrind', og ein leygardag var klárt hjá 19 monnum at fara í sving: Pápi, beiggi, systkinabørn og næstringar í Dali smekkaðu veggirnar upp, negldu tróðurplátur, settu í vindeygu og taktu. Børn hjálptu til og konufólkini syrgdu fyri mati og drekka. Tá ið dagurin var av, stóð "Snikkarakjallarin í Dali" liðugur! Eitt monument yvir bygdamenning í verki ...

Hendan søgan sigur mær, at alt prátið um bygdamenning og burðardyggar verkætlaninr bert er 'snakk'. Vit kunnu orða niðurstøðuna eitt sindur øðrvísi: Býrt tú 'ikki so langt burturfrá', so hevur tú eitt fíggingarkervi, ið tekur teg fyri fult; býrt tú 'langt burturfrá', so hevur tú einki fíggingarkervi at venda tær til, men mást dúva uppá vælvild, eginogn og likviditet frá fólki, sum kenna teg persónliga og hava álit á á tær. Eg var ikki bert treiskur, men eisini heppin: Eftirsum eg kom úr Havn, so hevði eg góð sambond í handilsumhvørvinum har, ið kundu og vildu fíggja mítt virksemið í Dali; tað er valla skeivt at rokna við, at ein sandoyingur – við sama førleika og somu ætlan – ikki hevði havt sama møguleika fyri fígging sum eg havi havt. Við øðrum orðum: Ein havnarmaður hevur størri møguleika at fara undir virksemi á bygd enn ein 'lokalur'! Her er okkurt ravruskandi galið ...

Søgan um hesa burðardyggu ætlan 'langt burturfrá' vísir, at fíggingarstovnarnir als ikki kenna tað landið teir virka í og teir møguleikar, sum í tí liggja. Eg nevndi í byrjanini, at fíggingarstovnarnir bert eru til fyri teir partar av landinum, ið eru væl fyri. Lat meg taka orðingina í meg aftur. Ikki tann partin, sum viðvíkur fíggingarstovnunum, men lýsingina av útjaðaranum. Tað er eftir mínari meting fullkomuliga burturvið at siga, at ein bygd sum t.d. Dalur er illa fyri. Tvørturímóti! Her finst eitt so yðjandi ríkidømi, sum eg fyri fáum árum síðani ikki hevði ánilsi av. Vit liva eina luksustilveru og stórtrívast: Vit hava samband við fleiri fólk, enn vit høvdu á Norðasta Horni, døturnar hava alla bygdina sum spælipláss og vit hava somu hentleikar sum áður. Tá ið børnini veksa til, so er skúli í bygdini, framhaldsskúli í oynni, ítróttarfelag og you name it ... Og er okkurt í Havn – ein føðingardagur, eitt tiltak, eini ørindi – so eru vit har í bili, áðrenn tími er farin. Í Sandoynni er stórt sæð alt, sum er í Havn! Umframt alt hitt: Í mai var eg eftir havhestaeggjum, og nú stendur fleygingin fyri ...

Og eitt virki í Dali? Perfekt! *Og eg eri vísur í, at slíkt lønandi smávirksemi kundi verið nógva staðni kring landið.* Lat meg brúka hendan kjansin fyri at gera reklamu. Ikki bert fyri mínum egna virki, men eisini fyri tí veruleika, at tað ber til at liva eina modernaða tilveru á bygd: Vilt tú hava eina trappu, so kanst tú eina ferð seinni í ár fara inn á heimasíðu mína www.bodvar.fo og síggja tey trappumodell, sum eg kann levera.

Eg eri fullvísur í, at børn okkara fara at takka mær fyri avgerðina at flyta til Dals. Bert spell, at okkara fíggingarstovnar og okkara politiska skipan ikki stuðla teimum, sum hava hug til at fáa burturúr teimum møguleikum sum eru fyri lønandi, vinnuligum virksemi á bygd.

*Bødvar Poulsen*

# Kann ferðavinna styrkja fiskivinnusamfeløg?

Lunenburg liggur í Nova Scotia, og har er størsta fiskivinnufyritøkan í Atlants-Kanada síðstu fimmti árini. Tá ið virksemið var av tí mesta, hevði Lunenburg stórar langfaratrolarar, ið landaðu stórar nøgdir til virkingar. Í sjeytiárunum arbeiddu 1200 fólk á fiskavirkinum í Lunenburg. Sum kunnugt vórðu kanadisku høvuðsstovnarnar niðurfiskaðir, og koma valla fyri seg aftur í bræði.

Lunenburg noyðist tískil at finna sær aðrar útvegir fyri at lívbjarga sær, og størsti denturin hevur verið lagdur á ferðavinnuna. Í norðuramerikanskum høpi er Lunenburg ein gamal býur, ið stavar frá miðskeiðis í 1700-talinum. Tað er ein vakur býur við mongum yndisligum bygningum, ið seta sín serstaka dám á miðbýin. Hesi serligu, gomlu eyðkenni hava havt við sær, at ST-stovnurin UNESCO í 1995 tilnevndi Lunenburg sum varðveitingarvert pláss fyri heimssamfelagið; bert heilt fá støð fáa slíkan status.

Uppá sera stutta tíð – síðani 1970-árini – er Lunenburg vorðin stórur ferðavinnubýur. Har eru bygdir nógvir nýggir handlar, matstøð og gistingarhús (bed and breakfast) til ferðafólk, og mangir søguligir bygningar o.a. hava fingið ta útsjónd, teir høvdu upprunaliga. Vinnulívið er eisini broytt. Ein av smiðunum, ið áður arbeiddi fyri fiskivinnuna, t.d., ger nú prýðislutir úr jarni, eitt. Aðrar fyritøkur, ið áður arbeiddu fyri fiskivinnuna, arbeiða nú t.d. fyri stuttleikabátarnar, ið koma hagar úr øðrum pørtum av Kanada og úr USA. Eitt fiskivinnusavn er eisini latið upp, har gamlir trolarar o.a. verða sýndir fram.

Hendan broytingin hevur sum vera man sínar vansar. Tey, ið búðu her frammanundan, halda stundum, at tað er trupult hjá teimum at vinna sær til lívsins uppihald, og at nýggja lívsmynstrið í Lunenburg hevur gjørt tað ov dýrt at búgva har. Størvini í ferðavinnuni eru ikki eins væl lønt og størvini í fiskivinnuni plagdu at vera, tí ferðavinnuarbeiðið bert er part av árinum, og tí at ferðavinnuarbeiðið mest krevur ólærda arbeiðsmegi og sostatt er verri lønt. Fremmandur kapitalur hevur fingið nógv størri ræði í Lunenburg, eins og inntøkumunirnir eru vorðnir nógv størri enn frammanundan.

Ferðafólkini hava ikki somu virðing fyri tí, ið stendur teimum lokalu nær kensluliga. T.d. hava minnissteinarnir fyri sjólætnar ikki sama týdning fyri hissini ferðafólk sum fyri tey, ið hava búð har í áravís. Fiskimenn plagdu at savnast í einum slag av 'undirhúsi', kallað 'Fishermens' Hall', men tað er nú tikið frá teimum til 'Lunenburg Community Center' (bygdarhús); gamla 'undirhúsið' hevur sostatt fullkomuliga mist tað samband, ið tað altíð hevur havt við sjógvin og fiskivinnuna.

Niðurstøðan av royndunum í Lunenburg er, at metast skal gjølliga um fyrimunir og vansar, skal tað eydnast at fáa eitt nýtt vinnuligt virksemi, í hesum føri ferðavinnu, at verða ein samansjóðaðan part av einum samfelag.

Hendan greinin er grundað á fyrilestur, ið Marian Binkley, professari, helt í Nóatúni mikudagin 26. apríl í ár. Fyrilesturin kann fáast við at venda sær til Granskingarverkætlanina.



*"Eingin ger tað ..."*

stoltur av síni egnu bygd og at gera hana til nakað serligt og lokkandi. Tí setti Ruskseletiltakið í síni tíð ein marknaðarráðgeva, ið skuldi skapa eina positiva ímynd av bygdini.

- Sjálvandi kostaði tað nakað, men pengarnir vóru væl farnir. Alt hitt hevur verið sjálvboðið arbeiði, sigur Sven-Oluf Dahlgren.

Í fyrstani kravdi tað stóra orku at venda gongdini. Í dag verður virkað fyri framhaldandi at gera Rusksele til eitt gott stað at búgva og virka hjá fólki í øllum aldursbólkum.

# Trygd á sjónum

27. apríl helt Marian Binkley, professari úr Nova Scotia, Kanada, fyrilestur í Fuglafjarða skúla. Evnið var trygd á sjónum.

Hon grundaði fyrilesturin á eina kanning millum fiskimenn í Nova Scotia, og legði dent á, at kunnleiki til hugburð fiskimanna og arbeiðsumstøður teirra er avgerandi fyri tey, ið virka fyri at bøta um trygdina.

Umleið 40 fólk vóru møtt á fundinum, flestir siglandi menn og umboð fyri myndugleikar, ið varða av trygdarspurningum.

Fyrilesturin hjá Marian Binkley kann fáast við at venda sær til granskingarverkætlanina.

# Nýhugsan til gávus

»'Esther' í bakborð og 'Fugltúgvan' í stýriborð«. Soleiðis umrøddi John Smith, sáli, ideal-skipið til veiðu á føroyska landgrunninum. Snellur í bakborði og línu í stýriborði. Sonur John, Leon Smith, verkfrøðingur, gjørdi høvuðsuppgávu um skipið á Danmarks Tekniske Universitet í 1992.John Smith gjørdi síðani – saman við fleiri – eitt modell av skipinum. Heldur enn at lata modellið standa goymt og gloymt, so hevur Leon gjørt av at lata Granskingarverkætlanini fyri Økismenning modellið umframt filmar í varðveitslu.Tað er ikki av tilvild, at tað er økismenningin, Leon hevur havt í huga, tá ið hann avgjørdi hvagar ein partur av sjónliga hugsjónar-arvinum eftir John Smith skuldi plaserast:-Umframt at pápi okkara sá húkaveiðuna sum høvuðsgrundarlagið undir eini varandi burðardyggari veiðu, so metti hann eisini húkaveiðuna sum ein týðandi lið í eini vinnuligari menning fyri alt landið. Gjøgnumgangandi vóru fremstu hugskot hansara altíð framd í verki í tí sokallaða útjaðaranum, sigur Leon.

John Smith troling og blokkframleiðslu í bann, tí tey framleiddu eitt samfelagsbúskaparligt undirskot og eisini undirgravaðu náttúrugrundarlagið undir fiskivinnuni og harvið allan búskap okkara.

-Grundleggjandi hevði hann grein í sínum máli, men kundi tykjast í so kompromisleysur, tí vit hava brúk fyri fleiri veiðuhættum. Tann stóri spurningurin er bara hvar, nær og í hvønn mun, vit skulu brúka teir ymisku reiðskapirnar. Mín vón er, at vit í framtíðini kunnu fáa eitt breitt og væl grundað orðaskifti um, hvat burðardygg veiða er og hvussu vit skipa fyri henni, og at hetta orðaskiftið so líðandi fer at føra til optimala tøkni og góðan politikk á fiskivinnuøkinum øllum landinum at frama, sigur Leon Smith.

Richard Apostel leiðari, er sera takksamur fyri gávuna og vissar um at hon skal fáa eitt gott og sjónligt pláss at standa í.



# Ferðavinna á bygd í Írlandi

Eins og flestu øðrum londum hevur gingið aftur á hondina úti á bygd í Írlandi. Minkandi landbúnaðurin hevur minkað um talið av størvum á bygd og noytt fleiri ungfólk at flyta av bygd og í bý. Hinvegin, so royna nøkur bygdarsamfeløg – fjart frá hvørjum øðrum - at samstarva fyri at fáa ferðavinnuna at blása nýtt lív í bygdarsamfeløg teirra.

Síðani 1955 hevur Írland havt eitt landsumfatandi ferðaráð við seks økisráðum undir sær. Tað hevur eydnast ferðaráðnum at hjúkla um nakrar styrkir, ið írsk ferðavinna hevur: Eina tradition fyri vinsemi og gestablídni, eitt ódálkað náttúruumhvørvi, og samband við tey umleið 70 milliónir fólkini um allan heim, ið so ella so hava tilknýti til Írland. Hóast hetta, so verður Írland mangan mett sum eitt keðiligt ferðamál við vánaligum gistingarmøguleikum og keðiligum mati. Tað kann vera dýrt at koma hagar, og eisini at ferðast innanlands. Nógv regn og eitt umdømi sum eitt land við ófriði bøtir heldur ikki um.

Bygdaferðavinnan tók seg upp miðskeiðis í sekstiárunum, og fyri nøkrum árum síðani tóku 13 bygdir seg í felag og stovnaðu 'Samtakið fyri Bygdaferðavinnu'; bygdirnar liggja víða um í Írlandi og eru ymiskar, men hava hava nøkur felags eyðkenni. Samtakið setti sín egna marknaðarstjóra at bjóða fram pakkatúrar undir heitinum 'Írskir ferðadagar á bygd'. Hendan felags marknaðarføringin fyri fleiri smáar bygdir hevur víst seg at vera gandaorðið. Sjálvt bygdir við sera lítlari orku kunnu fáa bíleggingar gjøgnum stórar ferðaskrivstovur, tí tær gjøgnum samstarvið megna at marknaðarføra seg dyggiliga.

Ferðavinnan hevur sum vera man ikki loyst allar trupulleikar á bygd í Írlandi. Rætt er tað, at mangir smábøndur – heldur enn at fáa sær eitt annað starv – kunnu hava ferðavinnuna sum frammihjávinnu og sostatt varðveita landbúnaðarykið. Tað er tó púra greitt, at kappingin um áhugaverd ferðamál í Europa er beinhørð. Skal tað eydnast teimum framhaldandi at draga ferðafólk til sín, so má teirra stað verða sera lokkandi og hava tilboð, sum ferðafólk halda vera áhugaverd. Tey mugu marknaðarføra seg sum nakað heilt serligt, sum skilir seg burturúr, eisini í teirra egna landi.

Hendan greinin er grundað á grein eftir Micheál Ó Cinnéide og John Burke við loyvi frá høvundunum. Nærri upplýsingar um greinina kunnu fáast frá Granskingarverkætlanini.

Útgevari:
**Granskingarverkætlanin fyri Økismenning**
Jústagøta 1
**Postadressa:**
Postboks 159
700 Klaksvík
Tlf. 457744 & Fax 457743
Suðuroy: Tlf. 37 44 77
E-postur: region@region.fo
Heimasíða: www.region.fo
**Ábyrgd:**
Ólavur Waag Høgnesen
**Umbróting:**
Ólavur Waag Høgnesen
**Prent:**
Hestprent